RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing
# 2018

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ..... 3

2. Árið ..... 4

2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð ..... 4

2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt ..... 4

2.3 Vaksandi tollfrí søla ..... 4

2.4 Minkandi styrki í miðal ..... 5

2.5 Avlopskrav til avgjald ..... 5

2.6 Sølubúðir og tænasta ..... 5

2.7 Pantskipan ..... 6

2.8 Starvsfólkakostnaður ..... 6

2.9 Árið samanumtikið ..... 6

3. Búskapur ..... 6

3.1 Umsetningur ..... 6

3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ..... 7

3.3 Rakstraravlopskravið ..... 7

4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ..... 8

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ..... 8

4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ..... 9

4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar ..... 10

4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar ..... 11

4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva ..... 11

5. Ársroknskapur fyri 2018 ..... 13

5.1 Rakstrarroknskapur ..... 13

5.2 Fíggjarstøða ..... 14

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi, Drelnesi, Vestmanna og við Norðskála. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 32 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til umleið 32 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2018. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2018.

Tórshavn, tann 10. marts 2019

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

# 2. Árið

## 2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spirtus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni pr. íbúgva 15 ár og eldri. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur lægri alkohol styrki. Hetta kunnu vit bert fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni. Staðfestast kann, at einkarsølan hevur virka væl sum alkohol politiskt stýringsamboð hjá landinum. Henda broytingin í drekkimynstrinum hevur við sær minni inntøku hjá RSL – Og skyldast hetta avgjalds og príspolitikkin.

RSL hevur áhaldandi arbeitt miðvíst við at tillaga raksturin til hesar broytingarnar í alkoholnýtsluni. Rakstrarkostnaðurin hjá RSL er øktur nakað grundað á lønarhækkingar og aðrar vanligar príshækkingar í samfelagnum.

## 2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt

Handlarnir hjá Rúsdrekkasøluni selja alsamt meira veikan løg, tí serliga sølan av spiritusi er minkað. Hetta vísir seinasta uppgerðin hjá Rúsdrekkasøluni.

Av øllum vørusløgum vórðu seldir 187.591 litrar innanlands av reinum alkoholi í 2018. Í 2009 vórðu seldir tilsamans 189.082 litrar innanlands av reinum alkoholi.

Tølini vísa, at meira verður selt av víni, meðan minni verður selt av spiritusi. Í 2009 vórðu seldir 49.886 litrar innanlands av reinum alkoholi í víni. Í 2018 var talið 57.128 litrar av reinum alkoholi.

Í 2009 vórðu seldir 84.079 litrar innanlands av reinum alkoholi í spiritusi, men í 2018 var talið minkað heilt niður í 65.885 litrar.

Sølan av øli hevur at kalla verið óbroytt í mong ár, men hetta er broytt seinastu árini. Í 2009 vórðu seldir 53.453 litrar innanlands av reinum alkoholi í øli. Í 2018 vóru 62.935 litrar av reinum alkoholi.

Endamálið við Rúsdrekkasøluni var m.a., at hon skuldi virka fyri at tálma nýtsluni. Nýtslan í 1992 var 8,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2018 var hon 6,4 litrar.

Í hesum tølum sæst tann veruleiki, at rúsdrekkavanarnir eru nógv broyttir. Nógv meira veikt verður keypt enn sterkt, og fleiri njóta heldur enn bara at rúsa seg.

## 2.3 Vaksandi tollfrí søla

Minkar sølan av reinum alkoholi í Rúsdrekkasøluni, er øðrvísi við tollfríu søluni, sum hevur verið nógv vaksandi, serliga seinastu árini.

Sølan av tollfríum rúsdrekka í 2009 var 26.806 litrar av reinum alkoholi. Í 2015 var talið 35.068 litrar, og í 2018 vórðu seldir 38.884 litrar av reinum alkoholi tollfrítt.

Tollfría sølan av reinum alkoholi í spiritusi vaks úr 19.986 litrum í 2009 upp í 26.860 litrar í 2018. Sølan av reinum alkoholi í víni vaks úr 4.130 litrar av reinum alkoholi í 2009 upp í 10.516 litrar av reinum alkoholi í 2018.

Samlaða tollfría sølan er nú áleið 1,5 litrar í miðal fyri hvønn føroying árliga. Hetta talið skal leggjast aftrat teimum 6,4 litrunum, sum hvør føroyingur drekkur í miðal árliga.

Talið á 1,5 litrar av reinum alkoholi í miðal fyri hvønn føroying 15 ár og eldri árliga umfata tollfría sølu, sum Rúsdrekkasølan og bryggjaríini selja til flogvøllin og skip til proviantering. Ongi tøl eru tøk fyri søluna sjóvegis annars.

At munandi vøkstur er í tollfríari sølu, nýtist ikki at merkja, at nýtslan er vaksandi. Talan kann vera um, at nógv tollfrí søla, sum fyrr var í Kastrup og floghavnum uttanlands, nú verður avgreidd í Vágum.

## 2.4 Minkandi styrki í miðal

Hagtøl vísa eisini, at alkoholstyrkin í miðal av spiritusi, sum varð selt í Rúsdrekkasøluni í 1992, var 42,5 prosent. Í dag er miðalstyrkin av spiritusi, sum selt verður, 31,8 prosent.

Miðal alkoholstyrkin av øllum seldum vørum í Rúsdrekkasøluni minkaði úr 20,6 prosentum í 1992 heilt niður í 9,9 prosent í 2018.

Hesi yvirskipaðu tøl bera boð um broyttar vanar, og at sjálv alkoholstyrkin ikki longur hevur størsta týdningin fyri mong. – Dygd verður raðfest heldur enn nøgd.

## 2.5 Avlopskrav til avgjald

Stovninum er í 2018 álagt at veita landinum 16,048 mió. kr. í avlopi í mun til 16,848 mió í avlopi í 2017. Munurin á 800 tkr. er veittur sum avsláttur á borðvín og heitvín til loyvishavarar tvs. matstovur, gistingarhús, barrir o.l., ið nú fáa 14% í avslátri.

Avlopskravið er fastsett hvørt ár, sama um nýtslan veksur ella minkar. Eitt avlopskrav hevur verið álagt stovninum, síðan hann kom. Málið var, at avlopið lutvíst skuldi nýtast at fíggja upplýsandi virksemi um skaðarnar av rúsdrekka og til at viðgera rúsdrekkamisnýtslu.

Rúsdrekkasølan hevur mælt politisku skipanini til at avtaka fasta avlopskravið og heldur leggja avgjøld á vørurnar, so avlopið fylgir nýtsluni.

Gongdin hevur verið, at færri litrar av reinum alkoholi verða seldir, og tí er vorðið alsamt truplari hjá Rúsdrekkasøluni at halda avlopskravið. Ein greið andsøgn er í, at stovnurin skal virka fyri at tálma nýtsluni, men noyðist at selja meira fyri at halda kravið. Eisini kann tann margháttliga støða íkoma, at neyðugt er at biðja um eykajáttan frá sama myndugleika, sum skal hava avlopið, fyri at halda kravið á 16,048 mió. kr.

Avlopskravið á fíggjarlógini á 16,048 mió., bleiv rokkið í 2018. Tað bleiv selt nakað meira av víni og øli, meðan tað bleiv selt minni av spiritusi og áleið tað sama av heitvíni og alkoholfríum vørum. Søluvøksturin í litrum stavar bæði frá øktari tollfríari og innanlands sølu.

Leiðslan í RSL hevur í tíðarskeiðnum millum 2010 og 2018 gjørt stórar tillagingar fyri at røkka økta avlopskravinum, sum í 2009 fór úr 11,848 mió. til 16,848 mió. í 2010 og síðan niður á 16.048 mió. í 2018 og frameftir.

Arbeitt verður áhaldandi ímóti einum skynsamari rakstri og bygnaði fyri at minka um útreiðslurnar uttan at niðurlaga tænastustøði.

Nýtslan í 2018 er enn á lægsta støði síðan RSL varð stovnað í 1992. Og er tað í trá við endamálið hjá RSL, ið m.a. sigur, at "Stovnurin skal, í so stóran mun, sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið."

## 2.6 Sølubúðir og tænasta

Arbeitt hevur eisini verið við at menna landsfyritøkuna – Ynski er, at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum, og tí er umráðandi, at dentur áhaldandi verður lagdur á at

uppfylla tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og ynskja. Arbeitt verður miðvíst við at laga seg til tær broytingar, ið eftirspurningur og viðskiftafólk ynskja.

Í fleiri ár hevur leiðslan eftir fíggjarligum førimuni havt fokus á at dagføra og uppstiga handlarnar kring landið og hetta arbeiðið hevur gingið væl.

Eftir at ein nýggj søludeild bleiv latin upp við Norðskála í 2015 og ein í Vestmanna í 2017 eru fløskumóttøkurnar á deildum raðfestar.

Deildirnar í Saltangará, Klaksvík og Miðvági hava allar fingið nýggjar fløskumóttøkur við 2 maskinum í 2018. Hetta er ein munandi uppstigan í tænastuni og skuldi hetta fyribils nøktað tørvin hjá viðskiftafólki okkara.

### 2.7 Pantskipan

Rúsdrekkasøla Landsins mælti í 2016 til, at sett verður á stovn ein nýggj pantskipan, sum skal taka sær av at savna inn allar fløskur og íløt, krevja inn og gjalda út pantið og standa fyri at skilja og beina tilfar til endurvinningar. Enn er tó ikki nakað ítøkiligt hent í hesum máli.

### 2.8 Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaðurin hækkaði í tíðarskeiðnum 2009-2018 til index 110. Starvsfólkakostnaðurin svaraði í 2018 til 10% av umsetninginum.

### 2.9 Árið samanumtikið

Samanumtikið metir leiðslan, at árið eydnaðist væl, men neyðugt er áhaldandi at tillaga raksturin fyri at ganga øktu rakstrarútreiðslunum á møti. Eisini er broytta keypsmynstrið, ið hevur lægri inntøku við sær, ein avbjóðing, nú avlopskravið er óbroytt.

## 3. Búskapur

### 3.1 Umsetningur

Seinastu níggju árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 117 og 136 mió. kr.

Umsetningurin í 2018 er hin størsti, síðan RSL varð sett á stovn. Á talvuni niðanfyri sæst, at umsetningurin er væl hægri enn hini árini.  Sølan í 2018 var góðar 2,8 mió hægri enn í 2017 og 8,5 mió hægri enn í 2016.

Orsøkin til hesa hækking stavar í stóran mun frá fólkatilflyting, at samfelagsbúskapurin er sera góður, umframt at tollfría sølan eisini er økt munandi.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur | 135.991 | 133.161 | 127.438 | 125.766 | 119.286 | 118.800 | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2009-2018*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Gongdin í mánaðarligu søluni í 2018 býtir seg eins og árið fyri. Allir mánaðir uttan apríl, september og oktober vóru betri enn væntað. Lægsta søla er vanliga í byrjanini av árinum, meðan summarsølan og sølan fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.

| (1.000 kr.) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 6.930 | 6.829 | 6.984 | 6.675 | 6.903 | 6.719 | 6.576 | 6.086 | 6.290 | 6.577 |
| Februar | 8.766 | 8.361 | 8.364 | 7.824 | 7.527 | 7.473 | 7.822 | 7.405 | 7.777 | 8.181 |
| Mars | 11.138 | 9.547 | 9.275 | 9.788 | 8.016 | 10.235 | 9.068 | 8.954 | 10.435 | 8.061 |
| Apríl | 9.537 | 10.218 | 10.025 | 9.220 | 8.883 | 7.859 | 9.301 | 9.436 | 7.560 | 9.397 |
| Mai | 12.710 | 11.526 | 10.763 | 10.433 | 10.295 | 10.887 | 10.814 | 9.823 | 9.958 | 10.054 |
| Juni | 12.582 | 12.450 | 11.557 | 11.299 | 10.477 | 11.210 | 10.949 | 10.400 | 10.536 | 9.942 |
| Juli | 15.315 | 14.403 | 14.775 | 14.558 | 14.332 | 13.054 | 13.844 | 14.402 | 15.957 | 15.243 |
| August | 11.429 | 10.597 | 9.830 | 9.709 | 9.406 | 9.499 | 9.025 | 8.543 | 8.541 | 8.173 |
| September | 9.310 | 10.191 | 9.432 | 8.901 | 8.298 | 8.006 | 7.955 | 9.010 | 8.480 | 7.625 |
| Oktober | 9.908 | 9.923 | 9.506 | 10.555 | 9.667 | 8.445 | 8.811 | 8.842 | 9.460 | 8.995 |
| November | 11.630 | 10.679 | 9.756 | 9.485 | 9.362 | 9.926 | 10.490 | 8.623 | 10.681 | 8.713 |
| Desember | 16.736 | 18.437 | 17.171 | 17.319 | 16.120 | 15.487 | 15.483 | 16.134 | 15.068 | 16.839 |
| **Íalt** | **135.991** | **133.161** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** | **120.743** | **117.799** |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2009-2018*

## 3.3 Rakstraravlopskravið

Kravið til avlop av rakstrinum varð í 2010 hækkað við útvið 50%, úr 11,848 mió. til 16,848 mió. Hetta hevur havt munandi príshækkingar á vørunum við sær, umframt umfatandi rationaliseringar, til tess at minka um útreiðslurnar. Hetta ber við sær at viðlíkahald og útskifting av útbúnaði hevur verið tálmað. Neyðugt hevur eisini verið, at havt eyka neyvt eftirlit við øllum kostnaði. Avlopskravið varð í 2018 lækkað við 800 tkr. ið vórðu latnar sum avsláttur til loyvishavarar og sostatt ikki høvdu nakað fíggjarligt árin á RSL.

Ein framgongd í umsetninginum frá 2017 til 2018, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er vaksin. Tó stavar hesin vøkstur nærum einans frá príshækkingum frá veitarum okkara.

Í 2018 vaks umsetningurin við 2,8 mió. í mun til undanfarna árið, og eydnaðist tað at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2018.

Kravið var kr. 16.048.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið bert kr. 16.062.641, tvs. ein munur uppá 14.641 kr.

Talvan 3.3 niðanfyri vísir gongdina í avlopi og játtan hjá RSL í tíðarskeiðnum 2009-2018.

| (1.000 kr.) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 16.048 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 11.848 |
| Avlop | 16.063 | 16.951 | 16.732 | 16.856 | 16.650 | 16.856 | 16.849 | 16.308 | 16.505 | 11.731 |
| **Munir** | **15** | **103** | **-116** | **8** | **-198** | **8** | **1** | **-540** | **-343** | **-117** |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2009-2018*

At avlopskravið hækkaði so nógv í 2010, hevði við sær, at fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingunum innanhýsis. Førleikamenningin varð avmarkað, og væl minni varð brúkt til íløgur og viðlíkahald, enn í tíðini undan hækkaða avlopskravinum.

Við óbroyttum inntøkum er vandi fyri, at hækkaða avlopskravið fær óhepna ávirkan á tænastustøðið, menningina og trivnaðin. Neyðugar íløgur í fløskumóttøkur, handlar, tólbúnað, førleikamenning o.l., ið skulu gerast, viðvirka til, at tað frameftir gerst alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Hesin parturin viðgerð hagtøl og vísutøl fyri søluna í 2018 samanborðin við níggju undanfarin ár. Eisini verða viðmerkingar gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 50.930 | 51.401 | 52.665 | 53.980 | 54.200 | 53.925 | 54.841 | 55.117 | 56.276 | 53.814 |
| Klaksvík | 13.622 | 12.943 | 12.243 | 12.065 | 11.745 | 11.668 | 11.743 | 10.969 | 10.918 | 9.753 |
| Drelnes | 9.136 | 8.846 | 9.173 | 9.336 | 9.205 | 9.481 | 9.124 | 9.091 | 9.474 | 9.298 |
| Miðvágur | 6.970 | 6.897 | 6.517 | 6.740 | 6.960 | 6.874 | 6.961 | 6.693 | 6.867 | 6.069 |
| Sandur | 2.923 | 3.088 | 2.882 | 2.726 | 2.449 | 2.149 | 2.367 | 2.292 | 2.333 | 2.298 |
| Saltangará | 12.891 | 13.099 | 13.284 | 13.465 | 14.400 | 14.284 | 14.570 | 14.390 | 14.595 | 14.449 |
| Norðskáli | 7.193 | 6.797 | 6.136 | 3.848 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vestmanna | 1.909 | 1.304 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ordrar o.a. | 30.417 | 28.786 | 24.538 | 23.606 | 20.327 | 20.419 | 20.534 | 19.106 | 20.282 | 22.117 |
| **Íalt** | **135.991** | **133.161** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** | **117.659** | **120.743** | **117.799** |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2009-2018*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið javnur í árunum undan 2018. Umleið helvtin av umsetninginum í sølubúðum stavar frá deildini í Tórshavn.

Deildirnar í Klaksvík, Drelnesi, Miðvági og við Norðskála hava selt meira enn undanfarna ár, meðan deildirnar í Tórshavn, á Sandi og í Saltangará hava selt minni. Meira er eisini selt av bíleggingum (ordrum o.l.) á høðusgoymsluni á Hjalla. Sølan í nýggju deildini í Vestmanna stavar óiva m.a. frá deildini í Tórshavn og Miðvági. Tað er tó torført at gera eina endaliga niðurstøðu, tá so stutt er fráliðið síðani deildin í Vestmanna lat upp.

| (Vísutal) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 95 | 96 | 98 | 100 | 101 | 100 | 102 | 102 | 105 | 100 |
| Klaksvík | 140 | 123 | 123 | 124 | 120 | 120 | 120 | 112 | 112 | 100 |
| Drelnes | 98 | 96 | 96 | 100 | 99 | 102 | 98 | 98 | 102 | 100 |
| Miðvágur | 115 | 110 | 110 | 111 | 115 | 113 | 115 | 110 | 113 | 100 |
| Sandur | 127 | 124 | 124 | 119 | 107 | 94 | 103 | 100 | 102 | 100 |
| Saltangará | 89 | 94 | 94 | 93 | 100 | 99 | 101 | 100 | 101 | 100 |
| Norðskáli | 187 | 177 | 159 | 100 - | - | - | - | - | - | |
| Vestmanna | 146 | 100 | - - | - | - | - | - | - | - | |
| Ordrar o.a. | 138 | 114 | 114 | 107 | 92 | 92 | 93 | 86 | 92 | 100 |
| **Íalt** | **115** | **113** | **108** | **107** | **101** | **101** | **102** | **100** | **102** | **100** |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2009-2018*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2009 og í 2018 er samlaða vísutalið 115 í mun til í 2009.

Tað er stórur vøkstur í deildunum í Klaksvík, Sandi, Norðskála og Miðvági í tíðarskeiðnum 2009-2018. Eisini er vøkstur í bíleggingum (ordrum o.l.) og er hetta orsakað av øktari tollfríari sølu. Bíleggingar verða vanliga avgreiddir gjøgnum høvuðsgoymsluna á Hjalla. Afturgongd er í umsetninginum í Tórshavn, á Drelnesi og í Saltangará.

Samanumtikið er sølan í kr. vaksin og liggur relativt stabil kring landið.

## 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Eisini er sølan deild upp í innanlands sølu og tollfríari sølu. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| (Litrar) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **279.510** | **282.067** | **273.873** | **271.001** | **246.863** | **242.219** | **246.833** | **253.595** | **267.187** | **283.983** |
| *- Spiritus innanlands* | 206.971 | 208.903 | 205.159 | 201.846 | 191.510 | 192.252 | 200.028 | 207.354 | 225.030 | 230.179 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 72.540 | 73.164 | 68.714 | 69.155 | 55.353 | 49.967 | 46.805 | 46.241 | 42.157 | 53.804 |
| **Vín/cider** | **622.358** | **593.487** | **541.097** | **529.221** | **508.121** | **490.093** | **476.567** | **463.205** | **471.745** | **459.605** |
| *- Vín/cider innanlands* | 538.583 | 513.898 | 463.801 | 461.460 | 456.776 | 447.109 | 440.193 | 427.156 | 435.024 | 424.792 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 83.775 | 79.589 | 77.295 | 67.761 | 51.345 | 42.984 | 36.374 | 36.049 | 36.721 | 34.813 |
| **Heitvín** | **9.796** | **9.786** | **9.555** | **10.041** | **9.741** | **9.741** | **9.236** | **10.067** | **10.688** | **11.129** |
| *- Heitvín innanlands* | 7.318 | 7.579 | 7.648 | 8.323 | 8.079 | 8.699 | 8.232 | 9.051 | 10.026 | 9.803 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 2.478 | 2.207 | 1.907 | 1.718 | 1.662 | 1.042 | 1.004 | 1.016 | 662 | 1.326 |
| **Øl** | **1.166.007** | **1.142.219** | **1.086.767** | **1.060.514** | **1.025.672** | **980.493** | **1.036.304** | **1.032.874** | **1.100.784** | **1.102.801** |
| *- Øl innanlands* | 1.146.404 | 1.123.362 | 1.070.937 | 1.042.053 | 1.010.899 | 972.246 | 1.023.896 | 1.020.934 | 1.067.334 | 1.051.416 |
| *- Øl tollfrítt* | 19.603 | 18.858 | 15.830 | 18.461 | 14.773 | 8.247 | 12.408 | 11.940 | 33.450 | 51.385 |
| **Alkoholfrítt** | **4.023** | **3.900** | **2.268** | **1.200** | **776** | **928** | **1.401** | **935** | **831** | **579** |
| *- Alkoholfrítt innanlan* | 4.023 | 3.898 | 2.268 | 1.200 | 693 | 916 | 891 | 935 | 782 | 577 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | 0 | 2 | 0 | 0 | 83 | 12 | 510 | 0 | 49 | 2 |
| **Í alt** | **2.081.695** | **2.031.460** | **1.913.560** | **1.871.977** | **1.791.173** | **1.723.474** | **1.770.341** | **1.760.676** | **1.851.235** | **1.858.097** |
| *- Í alt innanlands* | 1.903.298 | 1.857.640 | 1.749.813 | 1.714.882 | 1.667.957 | 1.621.222 | 1.673.240 | 1.665.430 | 1.738.196 | 1.716.767 |
| *- Í alt tollfrítt* | 178.396 | 173.820 | 163.747 | 157.095 | 123.216 | 102.252 | 97.101 | 95.246 | 113.039 | 141.330 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2009-2018*

| (Vísutal, litrar) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **98** | **99** | **96** | **95** | **87** | **85** | **87** | **89** | **94** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 90 | 91 | 89 | 88 | 83 | 84 | 87 | 90 | 98 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 135 | 136 | 128 | 129 | 103 | 93 | 87 | 86 | 78 | 100 |
| **Vín/cider** | **135** | **129** | **118** | **115** | **111** | **107** | **104** | **101** | **103** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 127 | 121 | 109 | 109 | 108 | 105 | 104 | 101 | 102 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 241 | 229 | 222 | 195 | 147 | 123 | 104 | 104 | 105 | 100 |
| **Heitvín** | **88** | **88** | **86** | **90** | **88** | **88** | **83** | **90** | **96** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 75 | 77 | 78 | 85 | 82 | 89 | 84 | 92 | 102 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 187 | 166 | 144 | 130 | 125 | 79 | 76 | 77 | 50 | 100 |
| **Øl** | **106** | **104** | **99** | **96** | **93** | **89** | **94** | **94** | **100** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 109 | 107 | 102 | 99 | 96 | 92 | 97 | 97 | 102 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 38 | 37 | 31 | 36 | 29 | 16 | 24 | 23 | 65 | 100 |
| **Alkoholfrítt** | **695** | **674** | **392** | **207** | **134** | **160** | **242** | **161** | **144** | **100** |
| *- Alkoholfrítt innanlan* | 697 | 676 | 393 | 208 | 120 | 159 | 154 | 162 | 136 | 100 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 100 |
| **Í alt** | **112** | **109** | **103** | **101** | **96** | **93** | **95** | **95** | **100** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 111 | 108 | 102 | 100 | 97 | 94 | 97 | 97 | 101 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 126 | 123 | 116 | 111 | 87 | 72 | 69 | 67 | 80 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2009-2018*

Talva 4.4 vísur gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekseraði tøl. Størsta afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2009-2018 í vørubólkunum spiritus og heitvín, meðan størsta framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum vín/cider. Eisini er framgongd í søluni av øli og av alkoholfríum vørum. Hetta vísir greitt, at drekkimynstrið broytist soleiðis, at føroyingar nú keypa veikari sløg av rúsdrekka enn fyrr. Generella mynstrið er tó at innanlands søla er jøvn og minkar, meðan tollfría sølan innan flestu vørubólkar veksur.

## 4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.5 er sølan av rúsdrekkanøgdini umroknað til litrar av reinum alkoholi (alkohol litrar).

| (Alk. litrar) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **92.745** | **95.832** | **92.721** | **93.925** | **88.079** | **88.849** | **91.331** | **94.179** | **97.982** | **104.065** |
| *- Spiritus innanlands* | 65.885 | 68.649 | 67.449 | 68.563 | 67.688 | 70.140 | 73.527 | 76.516 | 82.375 | 84.079 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 26.860 | 27.182 | 25.382 | 25.362 | 20.391 | 18.709 | 17.804 | 17.663 | 15.607 | 19.986 |
| **Vín/cider** | **67.645** | **66.274** | **63.346** | **62.187** | **60.057** | **58.138** | **56.219** | **54.718** | **55.038** | **54.016** |
| *- Vín/cider innanlands* | 57.128 | 56.483 | 53.975 | 53.770 | 53.654 | 52.637 | 51.675 | 50.544 | 50.848 | 49.886 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 10.516 | 9.791 | 9.371 | 8.417 | 6.403 | 5.501 | 4.544 | 4.174 | 4.190 | 4.130 |
| **Heitvín** | **1.691** | **1.710** | **1.658** | **1.742** | **1.679** | **1.682** | **1.588** | **1.713** | **1.817** | **1.889** |
| *- Heitvín innanlands* | 1.273 | 1.337 | 1.334 | 1.452 | 1.408 | 1.516 | 1.424 | 1.554 | 1.707 | 1.664 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 418 | 374 | 324 | 290 | 271 | 166 | 164 | 159 | 110 | 225 |
| **Øl** | **64.025** | **62.946** | **59.397** | **57.547** | **55.142** | **52.435** | **54.923** | **52.774** | **56.056** | **55.918** |
| *- Øl innanlands* | 62.935 | 61.903 | 58.538 | 56.548 | 54.364 | 52.008 | 54.300 | 52.202 | 54.453 | 53.453 |
| *- Øl tollfrítt* | 1.090 | 1.043 | 859 | 999 | 778 | 427 | 623 | 572 | 1.603 | 2.465 |
| **Í alt** | **226.475** | **227.035** | **217.233** | **215.401** | **204.957** | **201.104** | **204.061** | **203.384** | **210.893** | **215.888** |
| *- Í alt innanlands* | 187.591 | 188.644 | 181.296 | 180.333 | 177.114 | 176.301 | 180.926 | 180.816 | 189.383 | 189.082 |
| *- Í alt tollfrítt* | 38.884 | 38.391 | 35.936 | 35.068 | 27.843 | 24.803 | 23.135 | 22.568 | 21.510 | 26.806 |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2009-2018*

Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir innanlands minka javnt, meðan tollfría sølan veksur. Hetta er í tráð við tálmandi politikkin, sum RSL arbeiðir eftir. Útvið helmingurin, tvs. uml. 41% av alkohol litrunum, stava frá sølu av spiritusi, meðan uml. 30% stava frá víni og cider. Øl søla stendur fyri 28% av samlaðu nøgdini av seldum alkohol litrum.

Samlað sæst, at sølan í alkohol litrum í tíðarskeiðnum 2009-2018 so at siga er óbroytt. Ein afturgongd hevur tó verið í alkohol litrum seldir í sølubúðunum hjá RSL, meðan ein framgongd hevur verið í tollfríari sølu.

| (Vísutal, alk.l.) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **89** | **92** | **89** | **90** | **85** | **85** | **88** | **91** | **94** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 78 | 82 | 80 | 82 | 81 | 83 | 87 | 91 | 98 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 134 | 136 | 127 | 127 | 102 | 94 | 89 | 88 | 78 | 100 |
| **Vín/cider** | **125** | **123** | **117** | **115** | **111** | **108** | **104** | **101** | **102** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 115 | 113 | 108 | 108 | 108 | 106 | 104 | 101 | 102 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 255 | 237 | 227 | 204 | 155 | 133 | 110 | 101 | 101 | 100 |
| **Heitvín** | **90** | **91** | **88** | **92** | **89** | **89** | **84** | **91** | **96** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 76 | 80 | 80 | 87 | 85 | 91 | 86 | 93 | 103 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 186 | 166 | 144 | 129 | 120 | 74 | 73 | 71 | 49 | 100 |
| **Øl** | **114** | **113** | **106** | **103** | **99** | **94** | **98** | **94** | **100** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 118 | 116 | 110 | 106 | 102 | 97 | 102 | 98 | 102 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 44 | 42 | 35 | 41 | 32 | 17 | 25 | 23 | 65 | 100 |
| **Í alt** | **105** | **105** | **101** | **100** | **95** | **93** | **95** | **94** | **98** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 99 | 100 | 96 | 95 | 94 | 93 | 96 | 96 | 100 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 145 | 143 | 134 | 131 | 104 | 93 | 86 | 84 | 80 | 100 |

*Talva 4.6: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2009-2018*

Talva 4.6 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er støðugt. Bólkurin spiritus er minkaður rættuliga nógv - serstakliga innanlands. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider umfram øl, eru einastu bólkarnir, har alkohol litrarnir eru markant fleiri, enn teir vóru í 2009.

## 4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar

Talva 4.7 niðanfyri vísir vøruúrvalið býtt í vørubólkar fyri tíðarskeiðið 2009-2018. Skilt millum tal á vørum seldar innanlands og vørur seldar tollfrítt, umframt at samlaða vøruúrvalið er víst.

| (Vøruúvæl. nøgd) | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **1187** | **1.057** | **890** | **840** | **771** | **541** | **536** | **527** | **597** | **514** |
| *- Spiritus innanlands* | *688* | 601 | 456 | 406 | 376 | 355 | 359 | 350 | 408 | 331 |
| *- Spiritus tollfrítt* | *499* | 456 | 434 | 434 | 395 | 186 | 177 | 177 | 189 | 183 |
| **Vín/cider** | **1604** | **1.447** | **1.154** | **1.086** | **1.150** | **952** | **976** | **863** | **1.036** | **883** |
| *- Vín/cider innanlands* | *1295* | 1.203 | 908 | 890 | 938 | 842 | 858 | 753 | 921 | 779 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | *309* | 244 | 246 | 196 | 212 | 110 | 118 | 110 | 115 | 104 |
| **Heitvín** | **96** | **101** | **89** | **90** | **80** | **69** | **67** | **58** | **81** | **50** |
| *- Heitvín innanlands* | *71* | 75 | 62 | 68 | 60 | 54 | 52 | 48 | 66 | 36 |
| *- Heitvín tollfrítt* | *25* | 26 | 27 | 22 | 20 | 15 | 15 | 10 | 15 | 14 |
| **Øl** | **647** | **576** | **379** | **314** | **230** | **217** | **281** | **217** | **227** | **198** |
| *- Øl innanlands* | *606* | 537 | 339 | 269 | 187 | 182 | 238 | 184 | 190 | 167 |
| *- Øl tollfrítt* | *41* | 39 | 40 | 45 | 43 | 35 | 43 | 33 | 37 | 31 |
| **Alkoholfrítt** | **44** | **40** | **18** | **9** | **14** | **14** | **16** | **6** | **10** | **8** |
| *- Alkoholfrítt innanlar* | *44* | 39 | 18 | 9 | 10 | 11 | 11 | 6 | 7 | 6 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | *0* | 1 | 0 | 0 | 4 | 3 | 5 | 0 | 3 | 2 |
| **Í alt** | **3578** | **3.221** | **2.530** | **2.339** | **2.245** | **1.793** | **1.916** | **1.699** | **1.991** | **1.685** |
| *- Í alt innanlands* | *2704* | 2.455 | 1.783 | 1.642 | 1.571 | 1.444 | 1.548 | 1.369 | 1.621 | 1.342 |
| *- Í alt tollfrítt* | *874* | 766 | 747 | 697 | 674 | 349 | 368 | 330 | 370 | 343 |

*Talva 4.7: Vøruúrvæl býtt í vørubólkar, 2009-2018*

Nógv størsta vøruúrvalið er í vørubólkinum vín/cider. Síðani koma vørubólkarnir spiritus og øl. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

Samanumtikið seldi Rúsdrekkasølan 3.578 ymisk sløg av løgi í 2018 í mun til 1.685 sløg av løgi í 2009. Vøruúrvalið og tænasta verða áhaldandi ment í mun til tað, ið rørir seg uttanlands, umframt í tráð við tað viðskiftafólk eftirspyrja. Mett verður, at hesin vøkstur fer at halda fram komandi árini og krevur hetta meir av starvsfólkum okkara, sum tó fegin arbeiða áhaldandi við at menna vøruúrvalið og kundatænastuna til frama fyri føroyingin og viðskiftafólk okkara sum heild.

## 4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva

Talva 4.8 niðanfyri vísur í fyrstu linju talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2009-2018.

| **Fólkatalið** | **2018** | **2017** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** | **2010** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðal 15 ár og eldri | 40.203 | 39.576 | 39.094 | 38.592 | 38.176 | 37.890 | 37.844 | 37.898 | 37.905 | 37.893 |
| Miðal tils. | 50.909 | 50.161 | 49.503 | 48.880 | 48.442 | 48.121 | 48.133 | 48.326 | 48.471 | 48.554 |
| **Nýtslan, alk.l. pr. íbúg** | **2018** | **2017** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** | **2010** | **2009** |
| Alk.l./15 ár + (RSL) | 4,7 | 4,8 | 4,6 | 4,7 | 4,6 | 4,7 | 4,8 | 4,8 | 5,0 | 5,0 |
| Alk.l./15 ár + (Samlað | 6,4 | 6,5 | 6,3 | 6,4 | 6,3 | 6,3 | 6,6 | 6,4 | 6,7 | 6,9 |
| Tollfrítt (Samlað í FO) | 1,5 | 1,4 | 1,3 | 1,2 | 1,0 | 0,9 | 0,8 | 0,7 | 0,6 | 0,7 |

*Talva 4.8: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2009-2018 og miðal sølan av alkohol litrum*

*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum gjøgnum RSL (*sí talvu 4.5*), verður sett í mun til talið av íbúgvum, sum eru 15 ár og eldri, sæst, at talið av alkohol litrum hevur verið fallandi.

Í 2009 er talið 5,0 alkohol litrar, og er síðani minkað til 4,7 alkohol litrar í 2018, sum ávíst í mittastu linju í talvu 4.8. Viðmerkjast skal tó, at hetta bert umfatar tøl fyri søluna av rúsdrekka gjøgnum RSL.

Hinvegin vísir næst niðasta linjan tøl, sum siga hvussu nógvar alkohol litrar føroyingar 15 ár og eldri í miðal keypa/drekka árliga. Hesi tøl umfata søluna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins og sølu gjøgnum føroysku bryggjaríini. Her sæst, at nýtslan í Føroyum er fallin frá 6,9 alk. ltr. til 6,4 alk.ltr. pr. íbúgva 15 ár og eldri í tíðarskeiðnum 2009-2018 .

Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tollfrítt og innflutt á annan hátt. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu. Tey tøl, sum síggjast niðast í Talvu 4.8 vísa tollfría vøru, seld gjøgnum RSL og føroysku bryggjaríini per. íbúgva 15 ár og eldri. Tað veruliga talið er óivað nakað hægri, tí her vantar tollfrítt innflutt av ferðafólki við skipi og tollfrítt innflutt við ferðafólki, ið hevur keypt rúsdrekka uttanlands.

# 5. Ársroknskapur fyri 2018

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2018 settur upp í mun til árið 2017. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## 5.1 Rakstrarroknskapur

| | **Ár 2018** | **Ár 2017** |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Vørusøla | 135.991.051 | 133.161.018 |
| Vørunýtsla | -95.670.970 | -92.941.250 |
| Skiftisavlop | 40.320.081 | 40.219.768 |
| | | |
| Útreiðslur: | | |
| Starvsfólkakostnaður | 13.956.962 | 13.983.822 |
| Avskrivingar | 1.736.150 | 1.296.235 |
| Annar kostnaður | 6.998.895 | 6.646.027 |
| Útreiðslur íalt | 22.692.008 | 21.926.084 |
| | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 17.628.074 | 18.293.684 |
| Fíggjarpostar | 33.596 | 55.238 |
| Roknskaparligt avlop | 17.661.669 | 18.348.922 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 17.661.669 | 18.348.922 |
| Avskrivingar | 1.736.150 | 1.296.235 |
| Íløgur | -3.335.178 | -2.694.570 |
| Nettoavlop | 16.062.641 | 16.950.587 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.048.000 | 16.848.000 |
| Munur | 14.641 | 102.587 |

## 5.2 Fíggjarstøða

| | 31.12.2018 | 31.12.2017 |
|---|---|---|
| **OGN:** | | |
| Støðisogn | 4.830.611 | 3.231.583 |
| Vørugoymsla | 11.303.323 | 14.883.536 |
| Vøru- og tænastuáognogn | 964.701 | 744.144 |
| Onnur áogn | - | 10.000 |
| Tíðaravmarkingar | 1.486.921 | 1.554.605 |
| Tøkur peningur | 5.500.656 | 3.611.562 |
| Ogn tilsamans | 24.086.212 | 24.035.430 |
| | | |
| **SKULD:** | | |
| Eginogn | 4.830.611 | 3.231.583 |
| Vøru- og tænastuskuld | 4.932.542 | 7.096.434 |
| Onnur skuld | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 10.618.935 | 10.840.110 |
| Tíðaravmarkingar | 2.167.467 | 1.781.609 |
| Meirviriðisgjald | 1.536.658 | 1.085.693 |
| Skuld íalt | 19.255.601 | 20.803.847 |
| Eginogn og skuld tilsamans | 24.086.212 | 24.035.430 |
| | | |
| Leasingskyldur | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | 3.964.213 | 4.397.463 |